RASMUSSEN & WEIHE
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
International worldwide cooperation

Á Glaðsheyggi
Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf (+298) 35 17 00
Fax (+298) 35 17 01
Reg. nr. 3752
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

# Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin

## Ársroknskapur 2005
(14. roknskaparár)

## Avrit

# INNIHALDSYVIRLIT

| | Síða |
|---|---|
| Almennar upplýsingar | 2 |
| Roknskaparátekning | 2 |
| Ársfrágreiðing | 3 |
| Grannskoðanarátekning | 4 |
| Nýttur roknskaparháttur | 5 |
| Rakstrarroknskapur | 6 |
| Fíggjarstøða pr. 31. desember | 7 |
| Gjaldførisfrágreiðing | 8 |
| Notur til ársroknskapin | 9 |

## ALMENNAR UPPLÝSINGAR

**Stovnurin**

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin
c/o Toll- og Skattstova Føroya, Suðuroyar Øki
FO-800 Tvøroyri

**Stýrið**

Sigurd Poulsen, formaður
Jógvan Vágsheyg, næstformaður
Gunnvør Dam Jensen
Ingeborg Vinther

**Grannskoðan**

**Rasmussen & Weihe**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F

## ROKNSKAPARÁTEKNING

Ársroknskapurin verður lagdur fyri stýrisfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, hin 28. apríl 2006

Stýrið:

| | |
|---|---|
| Sigurd Poulsen, formaður | Jógvan Vágsheyg, næstformaður |
| Gunnvør Dam Jensen | Ingeborg Vinther |

Roknskapurin er góðkendur á stýrisfundi hin / - 2006

Fundarstjóri

# ÁRSFRÁGREIÐING

## Virksemi

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er settur á stovn við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 við seinni broytingum.

Grunnurin hevur til endamáls at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðareftirløn.

Fæ grunsins verður fingið til vega við at allir persónar undir 67 ár rinda grunninum ¾ % av teirra árligu skattskyldugu inntøku og allir arbeiðsgevarar rinda ¾ av útgoldnu A-inntøkunum. Frá 1. januar 2006 er hetta broytt til 1%.

Stovnurin fór undir regluligar útgjaldingar til persónar yvir 67 ár tann 1. apríl 1997.

## Fíggjarlig lýsing

Í árinum er inngjaldið til grunnin frá løntakarum og arbeiðsgevarum økt við tkr. 34.096, og hetta kemst av, at gjaldið er hækkað frá ½ % til ¾ % av útgoldnu lønunum.

Útgjaldingin til pensjónistar er økt frá tkr. 48.009 í 2004 til tkr. 63.001 í 2005.

Avsetingar og tap uppá skuldarar eru á sama støði sum undanfarna ár.

Úrslitið áðrenn fíggjarligar postar gjørdist í 2005 eitt avlop uppá tkr. 30.430 ímóti einum avlopið uppá tkr. 11.058 í 2004.

Fíggjarligu postarnar netto eru at kalla óbroyttir í mun til undanfarna ár.

## Úrslit

Ársúrslitið í 2005 gjørdist eitt avlop uppá tkr. 42.128 ímóti einum avlopi uppá tkr. 22.858 fyri 2004.

Eftir hetta verður eginogn grunsins pr. 31. desember 2005 tkr. 373.260.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Einki er hent eftir roknskaparlok, ið hevur serligan týdning fyri metingina av ársroknskapinum.

## Framtíðin

Mánaðarliga upphæddin, sum var útgoldin sum arbeiðsmarknaðareftirløn, var í 2005 kr. 910. Gjaldið fyri 2006 er sett til kr. 1.185 pr. mánaða.

Umframt gongdina í búskapinum, hevur eitt vaksandi tal av eftirlønarmóttakarum ávirkan á útgjaldingina.

## Ognarviðurskifti

Grunnurin er ein sjálvseigandi stovnur.

Sambært lógini fyri grunnin verður valt eitt stýri at sita fyri grunninum. Hetta stýrið, sum skal hava 4 limir og sum verður valt fyri eitt 3 ára skeið, verður valt soleiðis: Ein limur umboðandi arbeiðsgevarar, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi Tryggingarfelagið Føroyar og stjórin í Landsbanka Føroya.

Landsstýrið tilnevnir formannin í stýrinum.

# GRANNSKOÐANARÁTEKNING

Vit hava grannskoðað ársroknskapin, greiddur av leiðsluni, fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin fyri árið 2005.

**Um grannskoðanina**
Í samsvar við alment viðurkendar grannskoðanarreglur er granskoðanin skipað og framd við tí endamáli at fáa eina grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi feilir ella vanta týðandi upplýsingar í roknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og risiko, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddum og øðrum upplýsingum í roknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eins og vit hava mett, um upplýsingarnir í roknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin er greiddur í samsvari við roknskaparkrøv í lóggávuni, og at hann gevur eina rættvísandi mynd av grunnsins ogn og skuld, fíggjarligu støðu og úrsliti.

Tórshavn, hin 28. apríl 2006

**Rasmussen & Weihe**
Statsaut. grannskoðarafelag P/F

| | |
|---|---|
| Klaus Rasmussen<br>statsaut. revisor | Joen Magnus Lamhauge<br>reg. revisor |

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

## Alment

Roknskapurin er greiddur í samsvar við góðan roknskaparsið.

Grunnurin er ikki bundin av at gera roknskap í tráð við ársroknskaparlógina, men roknskapurin er gjørdur sambært meginreglunum í ársroknskaparlógini.

Nýtti roknskaparhátturin er í høvuðsheitum hesin:

## Inntøkur

Inntøka grunnsins – arbeiðsmarkn.eftirlønargjaldið – er fyri løntakarar gjørt upp sum ¾ % av skattskyldugu inntøkuni í 2005 sambært fyribilsskattaskrásetingini.

Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarkn.eftirlønargjaldið gjørt upp sum ¾ % av útgoldnu A-inntøkuni fyri 2005.

Við roknskaparlok er ikki gjørligt at uppgera inntøkurnar fyri roknskaparárið endaliga, tí grundarlagið undir inntøkunum ikki er tøkt, við tað at sjálvuppgávurnar hjá persónum, sum inntøkurnar verða endaliga uppgjørdar eftir, ikki eru tøkar.

Hesar uppgerðir verða tí gjørdar í eftirfylgjandi roknskaparári. Broytingarnar eru tó ikki av eini tílíkari støddd, at tær hava týðandi ávirkan á roknskapin.

## Áogn

Skuldarar eru virðisásettir við frádrátti av møguligum tapsvanda, grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

## Lánsbrøv og partabrøv

Lánsbrøv og partabrøv eru upptikin til kursvirðið ultimo í árinum.

## Tíðaravmarkingar, áogn

Upphæddin umfatar útreiðslur í árinum, sum viðvíkja næsta árinum.

## Skattur

Grunnurin hevur, vísandi til løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, ikki skattskyldu.

# RAKSTRARROKNSKAPUR

| | Nota | 2005 | 2004 (t.kr.) |
|---|---|---|---|
| Nettoinntøka | 1 | 95.509.461 | *61.413* |
| Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn | | -63.001.390 | *-48.009* |
| Aðrar útreiðslur | | -1.335.214 | *-1.392* |
| Avsetingar og tap uppá skuldarar | 2 | -742.540 | *-954* |
| | | **30.430.317** | ***11.058*** |
| Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti | 3 | 3.281.672 | *745* |
| Ikki staðfestur kursvinningur/tap | 4 | -376.212 | *1.290* |
| Rentuinntøkur | 5 | 8.792.495 | *9.765* |
| | | **11.697.955** | ***11.800*** |
| **Ársúrslit** | | **42.128.272** | ***22.858*** |

# FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER

| | Nota | 2005 | 2004 (t.kr.) |
|---|---|---|---|
| **AKTIV** | | | |
| Áogn | 6 | 51.814.169 | *33.746* |
| Tíðaravmarking | | 6.852.305 | *4.085* |
| **Áogn íalt** | | **58.666.474** | *37.831* |
| | | | |
| Lánsbrøv og partabrøv | | 80.475.257 | *153.593* |
| Tøkur peningur | | 234.992.621 | *140.508* |
| **Íalt** | | **315.467.878** | *294.101* |
| | | | |
| **Umferðarfæ í alt** | | **374.134.352** | *331.932* |
| | | | |
| **AKTIV Í ALT** | | **374.134.352** | *331.932* |
| | | | |
| **PASSIV** | | | |
| **Eginogn** | 7 | **373.260.413** | *331.132* |
| | | | |
| Ov nógv innkravd arbeiðsmarknaðargjøld | | 181.242 | *176* |
| Onnur skuld | | 692.697 | *624* |
| **Skuld í alt** | | **873.939** | *800* |
| | | | |
| **PASSIV Í ALT** | | **374.134.352** | *331.932* |
| | | | |
| Møguligar aðrar skyldur | 8 | | |

# GJALDFØRISFRÁGREIÐING PR. 31. DESEMBER

| | 2005 | *2004* |
|---|---|---|
| | | *(t.kr.)* |
| Ársúrslit | 42.128.272 | *22.858* |
| | | |
| Broytingar í ogn og skuld grunnsins: | | |
| Am-gjald fyri eldri ár (arb. gevarar) | -66.622 | *-44* |
| Am-gjald fyri inniverandi ár (arb. gevarar) | -16.295.707 | *2* |
| Arbeiðsmarknaðargjøld, løntakarar | -1.706.013 | *862* |
| Tíðaravmarkingar | -2.767.675 | *-100* |
| Ov nógv innkravt arbeiðsmarknaðargjald | 5.636 | *-43* |
| Onnur skuld | 68.398 | *-197* |
| | | |
| Gjaldførisúrslit fyri árið | 21.366.289 | *23.338* |
| Gjaldførið pr. 1. januar | 294.101.589 | *270.763* |
| | | |
| Gjaldførið pr. 31. desember | **315.467.878** | ***294.101*** |

| | | |
|---|---|---|
| **Sundurgreining av gjaldføri:** | | |
| Lánsbrøv og partabrøv | 80.475.257 | *153.593* |
| Tøkur peningur | 234.992.621 | *140.508* |
| | 315.467.878 | *294.101* |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| | 2005 | 2004 (t.kr.) |
|---|---|---|
| **1. Nettoinntøka** | | |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, løntakarar | 49.449.559 | *31.879* |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, arbeiðsgevarar | 46.059.902 | *29.534* |
| **Nettoinntøka íalt** | **95.509.461** | *61.413* |

Nettoinntøkan – arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið – er fyri løntakarar gjørt upp sum ¾ % av skattskyldugu inntøkuni fyri 2005 sambært fyribilsskattaskrásetingini. Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið gjørt upp sum ¾ % av útgoldnu A-inntøkuni fyri 2005.

| | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| **2. Avsetingar og tap uppá skuldarar** | | |
| Avskriving krav um AM-gjald, løntakarar | 0 | *-396* |
| Broyting í avseting móti tapi uppá skuldarar, arbeiðsgevarar | 134.000 | *0* |
| Strikað krav, arbeiðsgevarar ið ikki skulu gjalda AM-gjald | -458.213 | *-408* |
| Avskrivað krav um AM-gjald, arbeiðsgevarar | -380.596 | *-141* |
| Avskrivað renta, arbeiðsgevarar | -37.731 | *-9* |
| **Avsetingar og tap uppá skuldarar íalt** | **-742.540** | *-954* |

| | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| **3. Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti** | | |
| Vinningsbýti partabrøv | 145.529 | *233* |
| Staðfestur kursvinningur/tap partabrøv | 3.905.597 | *408* |
| Staðfestur kursvinningur/tap lánsbrøv | -769.454 | *104* |
| **Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti íalt** | **3.281.672** | *745* |

| | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| **4. Ikki staðfestur kursvinningur/tap** | | |
| Ikki staðfestur kursvinningur/tap partabrøv | 0 | *1.858* |
| Ikki staðfestur kursvinningur/tap lánsbrøv | 376.212 | *-568* |
| **Ikki staðfestur kursvinningur/tap íalt** | **376.212** | *1.290* |

| | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| **5. Rentuinntøka** | | |
| Renta av arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldi, arbeiðsgevarar | 308.336 | *268* |
| Renta av lánsbrøvum | 4.487.662 | *5.099* |
| Renta av innistandandi | 3.996.497 | *4.398* |
| **Rentuinntøka íalt** | **8.792.495** | *9.765* |

| | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| **6. Áogn** | | |
| AM-gjald fyri 2004 og áður (arb.gev.) | 961.262 | *895* |
| AM-gjald fyri 2005 (arb.gev.) | 46.028.072 | *29.732* |
| AM-gjøld, løntakarar | 47.042 | *36* |
| AM-gjøld løntakarar desember 2005, goldið í januar 2006 | 4.777.793 | *3.083* |
| **Áogn íalt** | **51.814.169** | *33.746* |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| | 2005 | *2004* |
|---|---|---|
| | | *(t.kr.)* |
| **7. Eginogn** | | |
| Eginogn primo | 331.132.141 | *308.274* |
| Ársúrslit | 42.128.272 | *22.858* |
| **Eginogn ultimo** | **373.260.413** | ***331.132*** |

**8. Møguligar aðrar skyldur**

Tað áhvíla ikki grunninum aðrar møguligar skyldur, herundir borgs- og ábyrgdarskyldur, enn tær, sum eru nevndar í roknskapinum.